## Fjaldi seg í 14 ár

Í Italia hevur løgreglan handtikið leiðaran í teirri illa gitnu Camorra-mafiuni, Salvatore Russo. Í fjúrtan ár hevur løgreglan leitað eftir honum, og fríggjadagin bleiv hann funnin. Sagt verður, at hann hevði fjalt seg í einum loyniligum bústaði á einum høsnagarði uttan fyri Napoli. Tann 51 ára gamli Russo er fyrr dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri morð og onnur brotsverk, men síðani 1995 hevur hann ikki verið at finna. Løgreglan heldur handtøkuna hava sera stóran týdning, og at hon kann verða endin á virkseminum hjá Camorra-mafiuni.




## Jaspis og Amestyst hava landað

Í morgun landa ísfiakatrolararnir Jaspis og Ametyst í Saltangará. Skipini hava umleið 215.000 pund tilsamans, og meginparturin av veiðini er upsi. Á Landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará vænta tey, at onnur skip eisini koma inn at landa, sum vikan líður, og helst koma ísfiskatrolararnir Stelkur og Bakur miðskeiðis í vikuni. Hugsandi er, at aðrar landingar eisini verða á Beta í vikuni, men enn er ov tíðliga at siga, hvørji tey næstu skipini verða.

# Ætlanir skulu leggjast, hvus



**Krabbameinsfelagið er ovfarið av dygga stuðlinum, sum tiltakið "Føroyar móti krabba" gav leygarkvøldið.**
**- Endamálið við innsavningini er rokkið, og vit takka einstaklingum, feløgum og fyritøkum fyri allan tann peningaliga stuðul, vit hava fingið, sigur Jákup N. Olsen, formaður í Krabbameinsfelagnum**



INNSAVNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Stóra tiltakið í Norðurlandahúsinum "Føroyar móti krabba" leygarkvøldið eydnaðist so væl, at heilar 5.153.000 krónur komu inn til Krabbameinsfelagið.

Hetta er eitt nógv størri tal, enn nakar tordi at droyma um og formaðurin í felagnum, Jákup N. Olsen, var stórliga fegin, takksamur og rørdur, tá hann við endan av tiltakinum takkaði øllum, sum høvdu gjørt landsinnsavningina møguliga og føroyingum øllum fyri dyggu undirtøkuna.

### Framførslur

Fleiri túsund føroyingar sótu negldir við sjónvarpsskíggjan leygarkvøldið og sóu sendingina, har fólk høvdu høvi at hoyra og síggja tónleikaframførslur við ymiskum solistum og Føroya Symfoniorkestri aftanfyri í fleiri av framførslunum.

Ímillum framførslurnar og einstaka dansiframførslu, vóru innsløg við ymiskum lagnum, raktar av krabbameini, eins og hyggjarar og lurtarar fingu eina ávísa upplýsing um sjúkuna.

Innsavningin hjá Krabbameinsfelagnum heldur fram komandi dagarnar, og mangt bendir á, at upphæddin, sum latin er og tað, sum fer at koma inn á konto teir næstu dagarnar, verður nakað størri enn talið, vit kenna í dag.

Krabbameinsfelagið hevur sagt, at dyggi stuðulin fer at verða nýttur til granskin, fyribyrging og sjúklingastuðul.

Ætlanin er eitt nú, at ein serlækni í kvinnusjúkum skal upplæra ungar gentur at vera ambasadørar fyri Krabbameinsfelagið, so tær kunnu fara út í samfelagið at kunna um týdningin av at lata seg koppseta móti lívmóðirhálskrabba.

Sendingin "Føroyar móti krabba" varð send beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi leygarkvøldið, og hon vardi í heilar fimm tímar – frá klokkan sjey á kvøldi til midnátt.